# Um Norðurlendska Ráðharraráðið
– og hví tað hevur týdning fyri teg



# RING ORÐ Í TEKSTINUM



FULLVELDI: Tað at eitt land hevur fult ræði á øllum viðurskiftum sínum. Til dømis um landið skal hava ein her.

SJÁLVSTÝRANDI ØKI: Eitt land, sum hevur fult ræði á summum viðurskiftum, men ikki øllum. Til dømis so avgera Føroya Løgting og Landsstýri, hvussu tað skal vera at ganga í skúla í Føroyum, men ikki hvat slag av pengum vit nýta her.

RÁÐHARRI/RÁÐFÓLK: Tað fólkið í stjórnini í einum landi, sum hevur ábyrgd av einum ávísum øki.  Eitt umhvørvisráðfólk, til dømis, hevur ábyrgd av tí, sum hevur við umhvørvi, dálking og náttúru at gera.

FÓLKARÆÐI: Tá alt fólkið í einum landi ger av, hvør skal stýra landinum. Hetta merkir, at øll, sum eru 18 ár og eldri, kunnu atkvøða, tá tað er val, og at øll hava rættin at siga, hvat tey halda.

POLITIKARAR: Fólk, sum eru vald til at taka avgerðir. Tey kunnu vera í einum bygdarráði, kommunu ella á landsins tingi. Í Føroyum kalla vit okkara ting fyri Løgtingið.

FELAGSSKAPUR: Tá nógv fólk koma saman fyri at gera okkurt saman, ella tí tey eru samd um, at eitt øki er umráðandi, kalla vit tað ofta fyri ein felagsskap. Nógvir ymsir felagsskapir eru til. Reyði Krossur, Barnabati og Ítróttarsamband Føroya eru dømi um felagsskapir, sum eru í Føroyum.

GRANSKING: Tá serfrøðingar kanna okkurt sera gjølla, so tey kunnu fáa nýggja vitan, kallast tað gransking.

KUNNLEIKI: Tað, sum vit vita um ymiskt í okkara lívi og heimi. Tá vit finna útav onkrum nýggjum, til dømis við at granska, siga vit, at vit hava fingið nýggjan kunnleika.

AÐALSKRIVARI: Viðhvørt kalla vit ovasta leiðaran hjá einum felagsskapi fyri ein aðalskrivara.

STJÓRN: Tann ovasta leiðslan í einum landi. Í flestu norðurlondum nevna vit tann persónin, ið leiðir stjórnina, forsætisráðharra ella forsætisráðkvinnu. Í Føroyum kalla vit tey løgmaður.

POLITIKKUR: Soleiðis kalla vit tær ætlanir, sum politikkarar leggja fyri, hvussu eitt land skal vera at liva í, ella hvussu landið skal broyta seg.

ST: Stendur fyri Sameindu Tjóðir. ST er ein samskipan av øllum heimsins londum. Her møtast londini at tosa um trupulleikarnar, sum eru í heiminum, og hvussu teir kunnu loysast.

ES: Stendur fyri Evropiska Samveldið. ES er eitt samstarv millum 27 lond í Evropa. Tey gera felags reglur og seta felags mál fyri øki, so sum heilsu, veðurlag og mangt annað. Svøríki, Danmark og Finnland eru limir í ES.

VIRÐISLØN: Eitt annað orð fyri ein vinning ella heiðursløn, tá onkur til dømis vinnur eina kapping.

# HEY!

Vit gleðast um, at tú hyggur í henda faldaran, sum kann fortelja tær alt, sum er vert at vita um sterkasta samstarvið í Norðurlondum: Norðurlendska Ráðharraráðið. Tú hugsar kanska, at Norðurlendska Ráðharraráðið bara er fyri vaksin, men Norðurlendska Ráðharraráðið er eisini umráðandi fyri teg – og øll onnur børn og ung í Norðurlondum. Norðurlendska Ráðharraráðið er fyrst og fremst eitt samstarv millum tey norðurlendsku londini. Tú kanst lesa meira um okkum beint her!

## INNIHALDSYVIRLIT


**5** Hvat er Norðurlendska Ráðharraráðið?

**7** Hví samstarva vit júst í Norðurlondum?

**9** Hvat ger Norðurlendska Ráðharraráðið?

**11** Hvussu arbeiðir Norðurlendska Ráðharraráðið?

**13** Hvat fáa vit burturúr at samstarva?

**15** Norðurlendska Ráðharraráðið arbeiðir fyri børn og ung

**16** Her finnur tú Norðurlendska Ráðharraráðið

**18** Her kanst tú lesa um okkurt av tí, sum Norðurlendska Ráðharraráðið tekst við







## UM NORÐURLOND

Tey flestu norðurlondini eru rættiliga lítil, men tilsamans eru vit risastór.  Tilsamans fevna Norðurlond um heilar 3,5 milliónir ferkilometrar, og tað svarar til 528 milliónir fótbóltsvøllir. Og Grønland er nógv meira enn helvtin av hesum økinum – 60 prosent av samlaða norðurlendska økinum.

Samanlagt liva fleiri enn 27 milliónir fólk í Norðurlondum

Í Norðurlondum tosa vit meira enn sjey ymisk mál. Tey eru føroyskt, danskt, svenskt, norskt, íslendskt finskt, grønlendskt og fleiri ymisk sámisk mál. Sámarnir, eitt fólk, sum býr norðarlaga í Noregi, Svøríki, Finnlandi og Russlandi, tosa tey sámisku málini.



1971



# Hvat er Norðurlendska Ráðharraráðið?

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur verið til síðan 1971, og Ráðið hjálpir norðurlondunum at samstarva. Norðurlondini við **fullveldi**, Ísland, Noregi, Danmark, Svøríki og Finnland, stýra Ráðharraráðnum, og **sjálvstýrandi økini** Grønland, Føroyar og Álandsoyggjarnar eru við í samstarvinum.

Men Norðurlendska Ráðharraráðið er ikki bara eitt ráð. Tilsamans eru 12 ráð, sum arbeiða við ymsum evnum. Í ráðunum hittast norðurlendsku **ráðfólkini** at samráðast um sítt arbeiðsøki. Til dømis hittast øll veðurlags- og umhvørvisráðfólkini, at tosa um veðurlag og umhvørvi. Hetta er eisini galdandi fyri útbúgving, heilsu og mangt annað.

Tey fimm norðurlondini við fullveldi skiftast um at leiða arbeiðið í Norðurlendska Ráðharraráðinum. Hvørt land stýrir eitt ár í senn. Á henda hátt skiftast londini um at gera av, hvat Norðurlendska Ráðharraráðið skal savna seg um.









## VISTI TÚ...

Norðurlendsku málini skrivast við latínskum bókstavaraði. Føroyskt og norskt hava stavirnar æ og ø í felag, teir svara til svensku ä og ö, men bara føroyskt og íslendskt hava ð.






# Hví samstarva vit júst í Norðurlondum?

Norðurlond hava nógv í felag, og søguliga hava vit verið tætt knýtt hvørt at øðrum. Vit tosa fleiri mál, sum líkjast, serliga danskt, svenskt og norskt. Gerandisdagurin líkist eisini nógv her. Vit skipa skúlagongd og arbeiðsdagar sera eins í Norðurlondum.

Vit hava eisini eina felags hugsan um **fólkaræðið**, og hvussu tey, ið taka avgerðirnar, skulu bera seg at móti teimum, sum búgva í landinum. Samstundis eru eisini sera nógv feløg og **felagsskapir**, sum øll fólk kunnu gerast limir í. Á henda hátt kunnu tey vera við til at ávirka tær avgerðir, sum **politikarar** taka. Norðurlendska Ráðharraráðið samstarvar sera nógv við feløg og felagsskapir.

Og av tí at londini hava alt hetta í felag, gerst tað lættari at samstarva.





## HESUM VIRKAR NORÐURLENDSKA RÁÐHARRARÁÐIÐ FYRI

Vit skulu framhaldandi kunna ferðast millum øll norðurlond.

Norðurlond skulu verða burðardygg. Hetta merkir, at vit mugu liva uttan at slíta jørðina, ella fólkini her búgva, upp.

Javnstøða millum kynini er sera umráðandi í Norðurlondum. Javnstøða merkir, at kvinnur og menn skulu hava somu møguleikar, og at eingin ger mismun millum fólk.

Politikarar skulu lurta eftir børnum og ungum. Børn og ung skulu hava møguleika at ávirka sína verð og framtíð.






# Hvat ger Norðurlendska Ráðharraráðið?

Saman avgera ráðfólkini, hvat Ráðharraráðið skal arbeiða við. Tá tey hittast, tosa tey um, hvat arbeiði skal gerast í Norðurlendska Ráðharraráðinum innan teirra øki. Tey skulu øll vera samd um tær avgerðir tey taka. Tey samráðast eisini um, hvat pengar skulu nýtast til.

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur eisini eitt, sum eitur ein aðalskrivstova, ið er sum eitt slag av stórari skrivstovu. Her arbeiða fólk úr øllum norðurlondum, og her tosa tey svenskt, norskt og danskt. Tað er á hesi skrivstovu, at arbeiðið, sum ráðfólkini hava avgjørt skal gerast, verður gjørt. Á aðalskrivstovuni er ein **aðalskrivari**, sum leiðir tað arbeiði, ið verður gjørt hvønn dag í Norðurlendska Ráðharraráðinum. Men tað eru ráðfólkini, og tí allar **stjórnirnar** í norðurlondum, sum gera av, hvat arbeiðið skal snúgva seg um.







# Hvussu arbeiðir Norðurlendska Ráðharraráðið?

Arbeiðið í Norðurlendska Ráðharraráðinum snýr seg serliga um at fáa fólk úr ymsu norðurlondunum at møtast. Tí hjálpir Norðurlendska Ráðharraráðið norðurlendingum at samstarva. Tað kunnu eitt nú vera felagsskapir, sum arbeiða við rættindunum hjá børnum og ungum, ið fáa pengar til at skipa fyri einum fundi, har øll Norðurlond eru boðin við. Norðurlendska Ráðharraráðið gevur eisini gevur eisini fólki, sum gera filmar, bøkur ella faldarar um ymisk evni, pengar.

Tey, ið arbeiða á aðalskrivstovuni hjá Norðurlendska Ráðharraráðinum, savna **gransking** og **kunnleika** innan tey ymsu økini. So kunnu politikarar í stjórnum og tingum í Norðurlondum nýta hendan kunnleikan til at leggja sín politikk til rættis.  Til dømis, so hevur Norðurlendska Ráðharraráðið gjørt av, hvussu ráðini um sunnan mat skulu vera. Tey verða brúkt í øllum Norðurlondum, millum annað í skúlanum.

Og so skipar Norðurlendska Ráðharraráðið sjálvt eisini fyri stórum fundum. Til dømis fundum har børn sleppa at siga **politikarum**, hvat tey halda um ymiskt.





# Hvat fáa vit burturúr at samstarva?

Í Norðurlondum fáa vit eyka nógv burturúr at deila kunnleika við hvønn annan, tí londini líkjast so nógv. Um okkurt kanska riggar ordiliga væl í Svøríki, kann væl henda, at tað eisini fer at rigga sera væl í hinum norðurlondunum.

Samstarv ger okkum eisini sterkari. Norðurlondini eru øll lítil lond. Tí er tað umráðandi at standa saman, um vit vilja hoyrast í heiminum. Á henda hátt kunnu vit hava størri ávirkan á heimsins stóru lond.

Eitt nú samstarva Norðurlond ofta í **ST**. Her gerast vit sterkari, tá vit standa saman, so vit kunnu ávirka onnur lond. Eitt nú tá talan er um børn og ung, ella veðurlag og umhvørvi.

Norðurlondini, sum eru við í **ES**, samstarva eisini sera nógv har.




Góða Norðurlendska Ráðharraráð.
Vit hava eitt gott hugskot!

# Norðurlendska Ráðharraráðið arbeiðir fyri børn og ung

Eitt tað mest umráðandi málið hjá Norðurlendska Ráðharraráðinum er, at børn og ung í Norðurlondum skulu hava tað gott.

Tí arbeiða vit fyri, at hugsað verður gjølla um, hvussu øll økini, har Ráðharraráðið er virkið, ávirka børn og ung. Og hvussu børn og ung kunnu ávirka hetta arbeiði.

Vit samstarva tætt við teir felagsskapir, ið tala fyri børn og ung í Norðurlondum. Vit virka fyri, at tey ungu her verða hoyrd og tikin við, tá politikarar skulu taka avgerðir.

Vit vilja, at skúlanæmingar úr norðurlondum skulu kunna hittast. Vit gera felags verkætlanir fyri børn um tey norðurlendsku málini. Vit stuðla verkætlanum, har norðurlendsk børn og ung í felag kunnu stríðast fyri tí, tey halda er umráðandi. Vit vilja fegin, at børn og ung skulu vera uppaftur meira við í Norðurlendska Ráðharraráðinum og okkara arbeiði. Tú kanst altíð skriva til Norðurlendska Ráðharraráðið, um tú hevur eitt hugskot til eina verkætlan, har børn og ung í Norðurlondum kunnu gera okkurt saman.

Send hugskotið hjá tær til **nmr@norden.org**



# Her finnur tú Norðurlendska Ráðharraráðið



## VIÐ LANDAMARKIÐ

Um tú fert at ferðast í Norðurlondum, sært tú heilt greitt, at londini samstarva í Norðurlendska Ráðharraráðinum. Tí Norðurlond eru eitt samlað øki. Um tú býr í einum norðurlandi, kanst tú frítt ferðast um landamørkini til hini londini uttan at vísa pass. Undir heilt serligum umstøðum kann tó vera eftirlit á markinum. Hetta hendi eitt nú í 2020, tá nýggja koronavirusið kom til Evropa og nógv gjørdust sjúk, eisini í Norðurlondum. Men vanliga kunnu vit frítt ferðast um markið til hini londini og verða ikki steðgað. Tað er eisini lætt at arbeiða ella lesa í einum av hinum londunum.



## TIL HANDILS

Tú sært eisini Norðurlendska Ráðharraráðið, tá tú fert til handils. Norðurlendska Ráðharraráðið skipar fyri Svanamerkinum, sum er eitt av teimum allar fyrstu umhvørvismerkjunum. Hetta er eitt merki, sum vørur kunnu fáa, um tær lúka serlig krøv um heilsu og umhvørvi.



## Á BÓKAHILLINI

Norðurlendska Ráðharraráðið letur pengar til, at sera nógvar barna- og ungdómsbøkur, sum verða útgivnar í Norðurlondum, verða týddar til hini norðurlendsku málini. Hetta gera vit fyri at fremja norðurlendsku felagskensluna við bókum.

# HER KANST TÚ LESA UM OKKURT AV TÍ, SUM NORÐURLENDSKA RÁÐHARRARÁÐIÐ TEKST VIÐ

**LÓG OG RÆTTUR:** Um tað skal gerast uppaftur lættari at samstarva í Norðurlondum er tað umráðandi, at lógirnar og reglurnar í londunum líkjast. Hetta er partur av at samansjóða Norðurlond uppaftur meira.

**ARBEIÐSLÍV:** Í Norðurlondum skal tað vera gott at fara til arbeiðs. Eingin skal leggjast sjúkur ella verða uppslitin av starvi sínum. Samstundis skal tað vera lætt hjá fyritøkum at seta fólk í starv, líkamikið hvaðani úr Norðurlondum tey fólkini koma. Tí samstarva Norðurlond tætt um reglurnar á arbeiðsmarknaðinum.

**UMHVØRVI OG VEÐURLAG:** Norðurlondini vilja øll slóða veg, tá tað snýr seg um umhvørvi og veðurlag. Øll londini gera nógv fyri at gerast meira veðurlagsvinalig og burðardygg, men vit kunnu altíð gera tað betur. Um vit standa saman, kunnu Norðurlond fáa størri ávirkan á onnur lond í heiminum, so tey eisini ansa betur eftir jørðini.

**BØRN OG UNG:** Norðurlond skulu vera besta stað í heiminum fyri børn og ung. Hetta merkir, at Norðurlond skulu tryggja, at børn og ung hava tað gott, og at tey vita, at tey hava rættin at vera hoyrd. Tey skulu eisini hava møguleika at ávirka tær avgerðir, ið snúgva seg um tey.

**MENTAN:** List og mentan eru umráðandi partar partur av samanhaldinum millum norðurlond. List og mentan skapað í norðurlondum vísa tey virði, vit hava í felag.

**ÚTBÚGVING OG GRANSKING:** Norðurlendska Ráðharraráðið arbeiðir eisini fyri góðum samanhaldi um útbúgving og gransking í Norðurlondum. Hetta skal gagna bæði børnum, ungum og vaksnum.

**JAVNSTØÐA:** Í Norðurlondum skulu eins góðir møguleikar vera fyri øll, líkamikið hvat kyn vit eru. Javnstøða merkir, at kvinnur og menn hava somu møguleikar, og at eingin mismunur skal vera. Norðurlond hava samstarvað um javnstøðu í meira enn 40 ár.

**MÁL:** Tað er umráðandi, at vit í Norðurlondum framhaldandi royna at skilja hvønn annan og tey málini, vit hava í felag. Her er serliga talan um danskt, norskt og svenskt. Tað ger tað eisini lættari at ferðast, útbúgva seg og arbeiða um landamørkini, um vit skilja málini hjá hvør øðrum.



**Um Norðurlendska Ráðharraráðið**
**– og hví tað hevur týdning fyri teg**



Nord2021-046
ISBN 978-92-893-7079-0 PDF
http://doi.org/10.6027/nord2021-046

Hesin faldarin er eisini til taks á netinum:
www.pub.norden.org/nord2021-015

© Norðurlendska samstarvið 2021

Høvundur: Turi Kjestine Meyhoff
Ummælisbólkur: Amalie, 11 ár, Alfred, 11 ár, Minna, 10 ár,
Emma, 10 ár, Billie, 11 ár
Myndprýðing: Knud Andersen
Týðing: Marita Thomsen

**NORÐURLENDSKA SAMSTARVIÐ**

**Norðurlendska samstarvið er eitt av heimsins mest umfatandi økissamstarvum. Samstarvið fevnir um Føroyar, Grønland, Áland, Ísland, Danmark, Noregi, Svøríki og Finnland.**

**Norðurlendska samstarvið er rótfest í politikki, búskapi og mentan, og tað er ein týðandi viðspælari í evropeiska og altjóða samstarvinum.  Norðurlendska samstarvið virkar fyri sterkum Norðurlondum í einum sterkum Evropa.**

**Norðurlendska samstarvið skal styrkja norðurlendskum og økisbundnum áhugamálum og virðum í altjóðagjørda umheiminum. Felags virði landanna millum eru við til at styrkja støðuna hjá Norðurlondum, sum eitt av heimsins mest nýskapandi og kappingarføru økjum.**

**Nordisk Ministerråd**
**Nordens Hus**
**Ved Stranden 18**
**1061 København K**
**www.norden.org**

**Les fleiri norðurlendskar útgávur: www.norden.org/da/publikationer**

Nordisk Ministerråd
Nordens Hus
Ved Stranden 18
1061 København K
www.norden.org

Í Norðurlendska Ráðharraráðinum samstarva norðurlondini um alt frá veðurlagi og umhvørvi til útbúgving, arbeiðspláss og børn og ung.

Í Norðurlondum eru trý sjálvstýri, fimm fullveldi og 27 milliónir fólk. Tá vit arbeiða saman í Norðurlondum, eru vit sterkari og kunnu gera mun fyri alla jørðina.

Í faldaranum kanst tú lesa um Norðurlendska Ráðharraráðið

